## Iran avrættar mótstøðufólk

Í Iran hava myndugleikarnir avrættað nøkur av teimum 14 limunum í einum sunnimuslimskum felagsskapi, sum herfyri vórðu dømd til deyða. Almenna tíðindastovan Fars skrivar, at tey fyrstu eru hongd í fongslinum í býnum Zahedan. Tey dømdu vóru limir í einum felagsskapi, sum nevnir seg "Jundollah", sum merkir "Guðs hermenn", og tey vórðu dømd fyri at hava ført kríggj ímóti Guði og fyri at hava dripið ósek fólk. Iransku myndugleikarnir siga, at sunnimuslimski felagsskapurin samstarvar við al-Qaeda, og at felagsskapurin fær fíggjarligan stuðul frá USA.




## Kendur rasistur tikin í Ísrael

Í Ísrael hevur løgreglan tikið ein lim í teirri amerikonsku Ku Klux Klan-rørsluni. Maðurin, sum eitur Micky Louis Mayon, verður lýstur sum ein ein týðandi, amerikanskur rasistur. Myndugleikarnir hava leitað eftir honum síðani 2007, tí hann er skuldsettur fyri fleiri álop, eldáseting og fyri at hava medvirkað til harðskap í fleiri førum. Amerikanska løgreglan skuldi taka hann í 2007, men tað eydnaðist honum at flýggja til Ísraels. Síðani hava ísraelsku myndugleikarnir leitað eftir honum, og í gjár bleiv hann avdúkaður og settur í varðhald.



# Evropa skal hava streym úr oyðimørkini

**Tólv evropeisk orkufeløg skrivaðu í gjár undir ein samstarvssáttmála um at byggja eitt risastórt sólorkuverk í Sahara-oyðimørkini. Tað skal nøkta 15 prosent av tí evropeiska orkutørvinum í 2050**

ORKA
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*

-Í dag hava vit tikið eitt týðandi stig á leiðini at fullføra verkætlanina, segði Nikolaus von Bomhard, sum er stjóri í Munich Re, tá umboð fyri tey tólv feløgini høvdu skrivað undir sáttmálan.

Millum feløgini, sum eru við í teirri ovurstóru verkætlanini, eru týsku Siemens, RWE AG og Deutche Bank. Tey og hini feløgini skulu nú fyrireika eina íløguætlan, sum eftir sáttmálanum skal liggja klár í 2012.

Fekøgini aftan fyri tiltakið siga, at við hesari verkætlanini kann Evropa røkka sínum máli um burðardygga orkuframleiðslu.

### Úr Marokko til Saudiarabia

Ætlanin hjá teimum tólv feløgunum er at seta stór spegl í oyðimørkini líka úr Marokko í vestri til Saudiarabia í eystri. Sólstrálurnar geva vatndamp, sum setir generatorar í gongd, og orkan skal so flytast ígjøgnum eitt nýtt 300 kilometrar langt kaðalkervi undir Miðjarðarhavinum og haðani út um tað evropeiska meginlandið.

Verkætlanin er ikki bara stór, men eisini sera dýr. Feløgini hava roknað út, at bara sjálvt kaðalkervið fer at kosta einar 260 milliardir krónur, og at kostnaðurin fyri at fullføra alla verkætlanina fer at liggja oman fyri 3.000 milliardir krónur.

Ein orsøk til tann ovurstóra kostnaðin er, at tann nýggja elveitingin fer at krevja nýggjkar kaðalar um alt Evropa, tí verandi kaðalkervi kunnu ikki flyta meiri orku, enn tey longu gera.

### Fyri og ímóti

Franska tíðindastovan AFP skrivaði í gjár, at umboð fyri tey tólv feløgini hava verið á fundi við stjórnir í Evropa og Afrika um verkætlanina, men einki verður sagt um, hvat kom burturúr, ella hvussu langt tingingarnar eru komnar.

Fleiri hava longu sagt sína hugsan um verkætlanina. Umhvørvisverndarfelagsskapurin Greenpeace, Angel Merkel, kanslari og formaðurin í ES-nevndini, Jose Manuel Barroso, taka av fullum huga undir við ætlanini, men saqmbært AFP hevur ætlanin eisini møtt mótstøðu og iva.